

## Trý ár síðani Madeleine hvarv

Í dag eru trý ár liðin, síðani enska smágentan Madeleine McCann hvarv í Portugal. Í tí sambandi hava foreldur hennara gjørt ein stuttan film um Madeleine. Talsmaður fyri foreldrini sigur við BBC, at filmurin er gjørdur fyri at minna fólk á, at tað verður framvegis leitað eftir Madeleine. - At málið ikki er í fjølmiðlunum hvønn dag merkir ikki, at einki verður gjørt. Foreldrini hjá Madeleine brúka framvegis ein stóran part av lívinum til at leita eftir Madeleine, sigur talsmaðurin, Clarence Mitchell.

## Bilasølan veksur fjórða mánaðin á rað

Stórur vøkstur hevur verið í søluni av nýggjum bilum í Føroyum fyrstu fýra mánaðirnar. Samlaða bilasølan fyrstu fýra mánaðirnar í ár vísir eina økta sølu upp á 23,11 prosent. Størsti vøksturin er sum vera man í søluni av persónbilum. Her er talan um ein vøkstur upp á 40 prosent. Fyrstu fýra mánaðirnar í fjør vórðu seldir 174 persónbilar, men tilsvarandi talið í ár er 243 persónbilar.

# Váðasteinur fær rokningina

**OLJUDÁLKING** Sjálvvirkandi pumpuskipanin hjá Váðasteini virkaði ikki sunnudagin, tá ið olja varð pumpað úr einum tanga í annan. Úrslitið var, at 1200-1500 litar av olju fór á sjógv við Bursatanga í Havn

Randi Jacobsen

Oljuadálkingar frá skipum eru javnan í Havn, og ofta hongur Tórshavnar kommuna upp á rokningina, tí syndarin verður ikki funnin.

Men sunnudagin seinnapartin var lætt at síggja, at oljan, sum var farin á sjógv við Bursatanga í Havn, stavaði frá Váðasteini, sum nakrar tímar var komin inn.

Manningin visti ikki av nøkrum, fyrr enn politiið sendi boð eftir teimum. Samstundis var sløkkiliðið boðsent.



*Tað var Váðasteinur, sum var orsøkin til oljudálkingina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Vardi nakrar tímar

Nakað eftir at báturin var komin inn, var automatiska pumpuskipanin sett til at pumpa olju úr einum tanga yvir í brúkstangan. Eftir røttum skuldi pumpingin steðgaði, tá ið tangin var fullur, men tað gjørdi hon ikki, og tí fleyt olja yvir og á sjógv.

Tá ið sløkkilið kom til, hevði olja runnið á sjógv í stívliga tríggjar tímar.

Anfinn Reinert, varaleiðari í Tórshavnar sløkkilið sigur, at teir meta oljuna, sum fór á sjógv til at vera mllum 1200 og 1500 litar.

Tað var so heppið, at oljan ikki rak yvir móti bátabrúgvunum, men fór yvir móti molanum og fram við bryggjuni.

Sløkkilið fekk tikið nógv av gassoljuni upp, og nakað dampaði burtur. Men framvegis sæst ein filmur av olju fram við molanum og yvir móti Nyhavn. Eitt sindur er helst farið til havs.

Á midnátt var sløkkiliðið liugur við arbeiði sítt.

Av tí at staðfestast kundi, at oljan kom frá Váðasteini, fær reiðaríið rokningina fyri uppruddingina.

randi@sosialurin.fo

## Sparkaður í høvdið

**HARÐSKAPUR** Ein maður i 20-árunum varð leygarnáttina álopin í Havn og sparkaður í høvdið

Randi Jacobsen

Farna vikuskiftið í Havn var merkt av nógvum dýrandi fullum fólkum, og tað tulkar politið sum, at vikuskiftið var langt, og frítíðarlønin júst var komin.

Ein ungur maður meldaði, at hann sunnunáttina í Steinatúni var álopin av nøkrum tannáringum.

Ein maður í 20-árunum varð leygarnáttina álopin av nøkrum tannáringum uttan fyri eini hús, har hann hevði verið í balli. Sjálvur mintist maðurin einki, men vitni høvdu sagt honum, at hann var sparkaður í høvdið. Vitnini kundu eisini siga navnið av onkrum teirra, ið leyp á.

randi@sosialurin.fo

## Tøgn um samráðingarnar

Randi Jacobsen

Tá ið tey fimm arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag fóru til hús hóskvøldið, samdust tey um at leingja sáttmálan til á midnátt í kvøld. Sáttmálin gekk annars út leygardagin.

Klokkan 10 í dag vórðu samráðingarnar tiknar uppaftur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur boðað frá, at felagið ongar viðmerkingar hevur til samráðingarnar enn.

Sonja Jógvansdóttir, samskipari í Samtaki sigur, at tað gongur spakuliga fram-eftir. Hon sigur, at okkurt smávegis er komið upp á pláss.

– Eg haldi, at samráðingarandin er góður, og virðing er millum partarnar, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Enn eru partarnir ikki komnir til lønarspurningin, sum plagar at vera ta stóra stríðsevnið.

Samráðingarnir fara væntandi at halda á til langt út á kvøldið, og finna partarnir ikki útav at samráðast víðari, verða boð send eftir semingsstovninum.

randi@sosialurin.fo

# Meira í kommunukassarnar

**Kommunuskattur** Fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár eru góðar 20 mió. krónur goldnar meira í kommunuskatti samanborið við sama tíðarskeið í fjør

Randi Jacobsen

Tað gongur framvegis rætta vegin hjá kommunum at fáa skatt inn, og tað r galdandi bæði fyri smáu og stóra kommunurnar.

Tølini fyri smærru kommunurnar eru ov lág til at gera nakrar niðurstøður útfrá. Bara tað at eitt húshald flytir til ella frá, hevur stóra ávirkan í prosentum.

Men hyggja vit eftir størru kommunum, hevur serliga Sunda kommuna fingið væl meira í kassan. Fyrstu fýra mánaðirnar í fjør fekk kommunan 14.748.313 krónur inn í katti. Sama tíðarskeiðið í fjør var inntøkan 13.403.640 krónur. Tað savar til góð 10 prosent, og tí er hækkaða skattaprosentið ikki einasta orsøkin til hækkaðu inntøkuna.

Klaksvíkar kommuna hevur eisini havt rímiliga stóran vøkstur. 42.601.584 kónur í ár. Sama tíðarskeið í fjør var inntøkan 39.743.713 kónur. Tað er eisini størri vøkstur enn hækkaða skattaprosentið gevur.

Tórshavnar kommuna hevur tað eisini gott. 197.842.367 komu inn hesar fýra mánaðirnar í ár. Í fjør var upphæddin 185.745.129 krónur.

randi@sosialurin.fo

## Bilar gjøgnumrótaðir

Randi Jacobsen

Fríggjamorgunin komu tríggjar fráboðanir til politiið um gjøgnumrótaðar bilar í vesturbýnum í Havn.

Nógv bendir á, at tann, teir ella tey, sum hava verið inni í bilunum hava leitað eftir billyklunum. Í bilunum lógu ymiskir virðislutir, men teir høvdu ongan áhuga.

Í øllum trimum førunum vóru bilarnir ólæstir. Sloppið varð undan slíkum hendingum, um eigararnir læstu bilarnar, sigur politiið.

randi@sosialurin.fo